# Hvør eigur urtapottin ?

TÓRBJØRN JACOBSEN



Ein grønur vakstrarpakki rann púrasta óforvarandi upp í slokk í politisku skipanini fyri kortum. Javnaðarflokkurin var komin í politiska andaneyð í borgarligu sandwich´ini, og á einum samgongufundi kravdu teir, at nærum allar tær ætlaðu íløgurnar í Eysturoynni skuldu strikast, harímillum nýgerðin av vegi í Leirvík. Fæið, sum varð loyst við hesum, skuldi sambært sjónarváttum konverterast í ein borivogn, ið skuldi bora tunnil til Dals. Flokkurin hevði ætlað eina tvíliðaða strategi í almenna rúminum, at halda fast um betong og asfalt politikkin á lokaðum samgongufundi, tó við aðrari geografiskari raðfesting, og hinvegin at selja seg í almenninginum við einum snaruppfunnum grønum vakstrarpakka. Kongurin var framherji í fyrru ætlanini, meðan krúnprinsurin skuldi vera oddviti í seinru strategiini, sum hevði eitt stovnsfæ á 50 milliónir krónur, og sohvørt sum tað fór at øra fyri eygunum á Gummi Tarzan vaks talið til 400 milliónir, og besta boðið higartil er ein hálv milliard krónur.

Nú hevur ein samgongumaður hættað sær út úr samgongulosjuni fyri at siga Føroya fólki frá, at keisarin úti í Abert Hall og hansara teknar eru spillnaknir. Øll tey, sum manna fíggjarnevnd løgtingsins, kunnu vátta, at hvørt orð í greinini hjá Magna Laksáfoss er sannleikin, soleiðis, sum vit hava upplivað hann.

Tað kom ongantíð nakað initiativ úr fíggjarmálaráðnum undir fíggjarlógargerðini. Sohvørt sum tekniskar framrokningar vístu eitt vaksandi hall, vóru tær borðreiddar fyri okkum og hóast vit heittu staðiliga á Jóannes og Kaj Leo um at siga okkum, hvør fíggjar- og búskaparpolitikkurin hjá hesi samgonguni var, var onki í heinta, onki boð uppá nakað yvirhøvur, og var hetta orsøkin til, at hin nú so illa lýdda fíggjarnevndin mátti taka sakina í egnar hendur og umskipa seg til eina fíggjar- og búskaparpolitiska cellu við óvanliga lakum virkisumstøðum og metlágum tíðarhvarvi.

Bjálvingarmálið byrjar í fíggjarnevndini. Magni Laksáfoss átti hugskotið, og í fyrstu atløgu endaði tað við, at 15 milliónir krónur vóru játtaðar til bjálving av almennum bygningum. Hesum atkvøddu 31 tingfólk fyri. Um somu tíð kom hugskotið um at fylgja altjóða rákinum, um bjálving av eldri bygningum á privata sethúsamarknaðinum. Magni var eisini faðir at hesum uppskotinum. Saman við Annitu á Fríðriksmørk, Bill Justinussen og undirrrtaða smíðaði hann eitt uppskot hesum viðvíkjandi, sum hevði til endamáls at flyta tøkt fæ úr Húsalánsgrunninum í Bjál vingarstuðuslánsgrunnin. Fyri at vera loyalur mótvegis samgonguni nevndi hann hetta í einum korridorpráti fyri Eidesgaard. Áðrenn nakran varði, kom eitt tíðindaskriv úr fíggjarmálaráðnum, har ráðharrin boðar almenninginum frá, at hann ætlar eitthvørt á bjálvingarøkinum. Magni helt seg hava rokkið endamálinum, og tók seg aftur úr uppskotinum, sum framvegis liggur í tinginum, nú sum uppskot frá andstøðuminnilutanum í fíggjarnevndini. Síðani er onki hent uttan tað, at staðfestingin hjá Laksáfoss er røtt, táið hann sigur, at onkur livir politiskt av at nápa hugskot í eini roynd at liva av lántum fjaðrum.

Viðvíkjandi uppskotinum um lántøku, fyri at fíggja hallið á fíggjarlógini, er et siga, at tað var fíggjarnevndarformaðurin sjálvur, Annfinn Kalsberg, sum á einum fundi spurdi Sigurð Poulesen, landsbankastjóra, um rættast ikki hevði verið, at landsstýrið fekk eina lánsheimild samsvarandi fíggjarætlaða hallinum. Tá hesin var samdur við hugskotinum, var tað síðani varpað upp fyri Eidesgaard á einum seinri fundi, og soleiðis kom tað í lag.

Magni Laksáfoss hevur rætt í tí, at fíggjarmálaráðharrin ongi onnur átøk hevur framt í eitt hálvt ár, enn tey, at bera donsku bankapakkarnar í tingið. Tað er merkisvert, soleiðis, sum útlitini eru. Umframt lygnirnar, sum Jóannes Eidesgaard slapp at oysa uppúr sær í útvarpinum ígjárkvøldið, so siga undanførslurnar í endanum á útvarpaða kutinum alt um hvussu illa staddur maðurin er. Ein roknskaparkunngerð, Húsalánsgrunnurin, bjálving, nýggj játtanarlóg, betri fíggjarstýring og ein komandi eykajáttanarlóg skulu bjarga Føroyum úr eini vaksandi búskaparkreppu. Eg meini tað. At eta sítt egna og tað stolið.

Tá ið tú smokkar spakuliga í politiska mýrulendinum, er tað skiljandi, at øll vápn verða brúkt, eisini tey at prýða seg við lántum fjaðrum. Grøni vakstrarpakkin hjá John Johannessen er gott dømi um tað. Hugskotini og uppskotini eru komin úr fíggjarnevndini, fyrst og fremst frá Magna Laksáfoss. At Kaj Leo roynir at stúgva seg upp í løgmanstaburettina, við at stinga sín partamann í ryggin, tænir honum ikki til sóma.

Socialdemokratiski glantrileikurin líkist alt meira yrkingini hjá íslendinginum Tórarinn Eldjárn um Tarzan í stóra vakstrargarðinum – frumskógini. Í týðingini hjá kára p. endar sangurin soleiðis: "sum tekin um hvønn sigur hongur tarzan niður úr træðnum, og dinglar runt við dollarseðlum knýttum stramt um háls."

Grøni vakstrarpakkin er higartil bara ein lítil fittur økologiskur urtapottur, sum Laksáfoss og fylgisneytar hava latið farið oman eftir fíggjarnevndarbedingini, nú fæst at síggja hvussu væl tað verður honum sjóvað. Skuldi Javnaðarflokkuirn havt áhuga í at verið partur av hesum politiska nýbrotinum, umhvørvisferðini, er valla hugsandi, at nakar fer at forða teimum í hesum, og um tey fegin vilja fáa sín ognarskap í grøna vakstrarpakkanum, er tað í lagi, bara longu fingrarnir ikki enda í fauna´ini hjá hinum. Var tað ikki ein heimspekingur, sum einaferð segði, at móðirlandið hjá Javnaðarflokkinum altíð er har sum pengarnir hjá hinum eru?

# Eitt tinghús til 100 milliónir

FINNLEIF GUTTESEN



**- og 33 tingfólk ella ein skúla til 90 milliónir krónur og 200 næmingar**

Hugburðurin og mótviljin hjá ávísum borgarum í miðstaðarøkinum kemur greitt til sjóndar, nú Dimma skírir suðuroyingar dýrar á forsíðuni og onkur tinglimur hevur ilt í afturpartinum, tí skúlin í Hovi til 200 næmingar kostar 90 milliónir krónur.

Í mínari verð er eingin ivi um, at 90 milliónir krónur til skúlan í Hovi, eru tær sum fara at kasta nógv meira av sær, enn tær 100 milliónir krónurnar til tinghúsið, sum í stóran mun er sum ein barnagarður. Tinglimir duga tíverri ikki at síggja framtíðarútlitini fyri, hvat peningurin til ein skúla fara at kasta av sær.

Johan Dahl hevur jú púra rætt, tá sagt verður, at tingfólk bert »arbeiða« hálva tíð fyri høga løn og eina eftirløn sum eingin annar fær. Og hendan kostnaðar mikla »arbeiðstíðin« verður brúkt upp á smámál, so sum rundstykkir, hurðarlás, eina ella tvær tíðindadeildir í kringvarpinum og nevndarlimir í Atlantic Airways og annað, sum einki hevur upp á seg.

Tinglimir gráta rossatár yvir tað sum er fari, ístaðin fyri at taka seg um reiggj og leggja mál fram, so at Føroyar fáa ein sjálvberandi búskap. Uttan mun til politiskan lit, so er einki nýskapandi komi úr tinginum tey seinastu 15 árini, sum kann fáa Føroyska búskapin til at framleiða meira enn í dag.

Ting og tinglimir hava koyrt í somu rillu á lakkplátuni øll árini, teir tosa í mestan mun um, hvar og hvussu skattapengurin skal nýtast, men taka ikki upp á tungu, hvussu vit kunnu fáa fleiri skattapengar við at økja um framleiðsluna, ikki eitt orð.

Vælsignaðu tingfólk, takið tykkum saman, tí sum orðatakið sigur »eitt er at siga nakað, annað er at gera nakað« og har hoppar reimin av hjá tykkum.

Tit kunnu ikki gera sum Pilatus, ið vaskaði sær um hendurnar og segði, eg eri ósekur, tí tað eru tit ikki.

# Viðmerking til grein í Sosialinum nr. 59

INGRIÐ SONDUM

Í 1994 kom orðabók til skúlabørn út, sum var skipað eftir norðurlendskum bókstavarað, sum vit, ið gjørdu orðabókina, hildu, var einasta rætta at nýta í øllum Norðurlondum.

Bókstavaraðið var sett saman til orðabókina ORÐASKYN - Mín fyrsta orðabók í vón um, at onkur legði hetta til merkis.

Tað er so, at einki bókstavarað er góðkent í Føroyum. Vit hava góðtikið eitt skert (føroyskt ) bókstavarað í sínari tíð, men hava ikki dugað at sæð, at tað røkkur ikki at hjálpa okkum víðari. Í royndum má tíverri sigast, at hetta føroyska bókstavaraðið er ein forðing, tá ið vit skulu sláa orð upp á øðrum málum enn føroyskum. Í mønina fer tað bókstavaraðið, sum vit fyrst læra: tað føroyska.

Nú læra vit ikki bara føroyskt, so best er at ríka okkara bókstavarað við ikki bara nummarplátuni hjá Regin Eikholm, men eisini við íslendska »þ« og danska »å«.

Nógvar orðabøkur eru útkomnar síðan 1994. Eingin orðabókaútgevari hevur tikið okkara góða hugskot upp og skipa teirra orðabøkur eftir sama leisti, sum var nýttur til ORÐASKYN.

# Lesarabræv stendur fyri rokning løgtingsmannins

KAJ LEO JOHANNESEN

formaður í Sambandsflokkinum, vegna Sambandsflokkin



Løgtingsmaðurin, Magni Laksáfoss, hevur almannakunngjørt eitt lesarabræv undir yvirskriftini "Gamli løgmansflokkurin í politiskum tómrúmi".

Í lesarabrævinum eru útsagnir og skuldsetingar móti navngivnum politikarum í Javnaðarflokkinum. Sambandsflokkurin skal við hesum boða frá, at hvørki lesarabrævið ella nevndu útsagnirnar koma frá Sambandsflokkinum, ið hervið alment tekur frástøðu frá teimum.

Lesarabrævið stendur fyri rokning løgtingsmansins. Sambandsflokkurin, sum er í samgongu saman við Javnaðarflokkinum, hevur góð viðurskifti við Javnaðarflokkin og fegnast um samstarvið í ABC-samgonguni, eisini tann partin av samstarvinum, ið fevnir um búskapar- og fíggjarpolitikkin.